føroyar móti krabba

# TAÐ RAKAR OKKUM ØLL



**27. mars** í Kringvarpi Føroya

# FØROYAR MÓTI KRABBA

VIT STANDA SAMAN 27. MARS

Hvør króna ger mun

**Føroyar standa saman móti krabba 27. mars**

Leygarkvøldið 27. mars skipa Krabbameinsfelagið, Kringvarpið og Norðurlandahúsið fyri stóru landsinnsavningini "Føroyar móti krabba", sum verður send beinleiðis úr Norðurlandahúsinum.

Endamálið við landsinnsavningini er at stuðla Krabbameinsfelagnum at halda fram við arbeiðinum at hjálpa, ráðgeva, upplýsa og veita stuðul til gransking.

Í sendingini verður borðreitt við góðum tónleiki, forvitnisligum innsløgum, undirhaldi og áhugaverdum samrøðum. Vit fara m.a. at hitta sjúklingar, avvarðandi, granskarar og starvsfólk, sum dagliga taka sær av teimum avbjóðingum, sum krabbamein gevur.

Talið á krabbameinstilburðum økist. Umleið triði hvør føroyingur fær staðfest krabbamein eina ferð í lívinum, og tí røkkur sjúkan inn í flestu húski í landinum. Nógv hava mist, men tíbetur eru eisini nógv, ið verða frísk.

Á heysti 2009, tá Krabbameinsfelagið, Kringvarpið og Norðurlandahúsið skipaðu fyri fyrsta tiltakinum "Føroyar móti krabba", eydnaðist tað at savna inn 5,2 mió. krónur.

Leygarkvøldið 27. mars standa vit aftur saman móti krabba, og vónandi taka føroyingar væl undir við tiltakinum. Fleiri møguleikar eru at stuðla innsavningini, bæði undir sjálvari sendingini og í tíðini áðrenn.

Longu nú kunnu einstaklingar, fyritøkur og feløg stuðla við at flyta pening gjøgnum netbankan á konto hjá Krabbameinsfelagnum í føroysku peningastovnunum:

**BankNordik: 6460 — 618.088.6**
**Betri Banki: 9181 — 551.502.7**
**Norðoya Sparikassi: 9865 — 323.088.5**
**Suðuroyar Sparikassi: 9870 — 304.242.2**

Vikurnar upp til "Føroyar móti krabba" verða eisini tiltøk kring landið, sum fólk sjálvi taka stig til fyri at stuðla arbeiðinum hjá Krabbameinsfelagnum. Til dømis fara fleiri skúlaflokkar at skipa fyri innsavning. Hetta eru vit sera takksom og fegin um, tí hvørt oyra telur í stríðnum móti krabba.

**#FMK2021**

# FØROYAR MÓTI KRABBA

VIT STANDA SAMAN 27. MARS
Hvør króna ger mun



**Durita Tausen, forkvinna í Krabbameinsfelagnum:**
*"Málið hjá Krabbameinsfelagnum er áhaldandi at berjast móti krabbameini – við at stuðla gransking, upplýsa um fyribyrging og ikki minst at hjálpa og lætta um hjá teimum, sum eru rakt av krabbameini. Vit fegnast tí um, at tað aftur ber til at hava "Føroyar móti krabba", og at vit soleiðis kunnu lyfta í felag".*



**Ivan Hentze Niclasen, stjóri í Kringvarpi Føroya:**
*"Sum public service stovnur vilja vit fegin hjálpa Krabbameinsfelagnum við innsavningini. Kringvarpið kemur í hvørt hús, og hetta er eitt álvarsmál, sum er viðkomandi fyri allar føroyingar. Øll kunnu fáa sjúkuna, og vit kenna øll onkran, sum hevur ella hevur havt krabbamein. Tí fegnist eg um, at Krabbameinsfelagið, Norðurlandahúsið og Kringvarpið saman skapa karmarnar, soleiðis at føroyingar kunnu hjálpa".*



**Gunn Hernes, stjóri í Norðurlandahúsinum:**
*"Gjennom forskning og tilgjengelig behandling kan vi sammen forsøke å vinne kampen mot kreft. Vi ønsker å leve i et samfunn hvor de, som blir rammet, får den oppfølging, omsorg og trygghet, de behøver. Derfor står vi bak "Føroyar móti Krabba".*

Vilja tit vita meira um landsinnsavningina, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum:


**Jansy Gaardlykke, dagligur leiðari, Krabbameinsfelagið**
Tlf.: 317959 ella 217959
Teldupostur: jansy@krabbamein.fo

**Urd Johannesen, samskipari**
Tlf.: 223010
Teldupostur: krabbi2021@gmail.com


føroyar móti krabba